## DAGSINS MEINING

# Ein onnur røða

Framløga løgmans á ólavsøku, vanliga nevnd løgmansrøðan, var ein onnur røða enn løgmansrøður vanliga hava verið. Røðan er øðrvísi og harvið áhugaverd, tí hon er hildin í einum yvirskipaðum tóna, og tí hon er princippiel og sera frameftirrættað. Røðan er vend móti framtíðini við støði í altjóðagerðini. Sostatt er løgmansrøðan ein verulig viðurkenning av, at Føroyar til gott og ilt eru komnar upp í altjóðagerðina. Tað er við altjóðagerðini sum við veðrinum - okkum kann dáma hesa gongd ella ikki, sama ger: vit sleppa ikki undan henni. So eru bert tveir kostir í at velja: annar er ikki at látast um vón og samstundis vóna, at tað gongur nokk. Hin kosturin er at taka altjóðagerðina sum eina avbjóðing og sum ein møguleika.

Tað gongur sum ein reyður tráður gjøgnum framløgu løgmans, at landsstýrið hevur tikið tann seinna valkostin nevniliga at taka altjóðagerðina sum eina avbjóðing við ómetaligum møguleikum. Annars er ikki nógv av reyðum liti í hesi løgmansrøðu, ið ideologiskt ber dám av, at hon kemur frá eini samgongu, har tveir sera borgarligir og flokkar eru í meiriluta. Tað vil so vera. Hinvegin eiga landsstýrið og løgmaður rós fyri at seta sær eina visión fyri tey komandi tíggju árini og eina strategi fyri, hvussu røkkast kann at teimum málum, sum visiónin fevnir um. Hetta er alt annað líka skilagott, og eygleiðarar uttanlands eru samdir um, at tey lond, sum ikki hava mál og strategiir fyri at takla nýggju støðuna í heiminum við altjóðagerð og globalisering, ja, tey gerast skjótt eftirbátar í einum heimi við ómetaliga stórum og skjótum broytingum.

Visiónin er, at Føroyar í 2015 verða millum bestu lond at virka og liva í og, at Føroyar skulu verða eitt samfelag við sterkum búskapi, har arbeiði er til allar hendur, og har dygdargóðar sosialar skipanir tryggja øllum eitt virðiligt lív. Hesi mál eru so sjálvsøgd, at tað skuldi ikki verið neyðugt í 2005 at sett tey í eitt politiskt manifest. Men tað er neyðugt! Hesi mál byggja á meginreglurnar fyri norðurlendska vælferðarsamfelagið. Álopini á vælferðarsamfelagið eru støðugt harðnað seinastu 10-15 árini um øll Norðurlond. Tað verður tí ongantíð sagt ov ofta, at vit her hjá okkum halda fast um hetta samfelagsideal, sum verður samanfatað í heitinum vælferðarsamfelag. Skulu Føroyar røkka hesum málum er neyðugt við eini sera gløggari og vælgrundaðari strategi. Løgmaður og landsstýri hava nógv áhugaverd boð upp á hesa strategi. Vit fara at venda aftur til hesa strategi í eini komandi oddagrein.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tykkin og fátækur

**Frits Johannesen**



Nú um dagarnar frættist av tí danska politiska leikpallinum, at danskir politiskir flokkar vildu hava, at grønlendingar, sum fingu sosialan peningaligan styrk, skuldu læra seg betur danskt mál og vera tøkir á arbeiðsmarknaðinum. Gjørdu teir ikki tað, mistu teir hesi rættindi.

Tað rann mær til hugs, tá ið grønlendsk børn vóru flutt heimanífrá í fimmti árunum til Danmarkar at búgva fyri at verða ald upp í donskum máli og danskari mentan. Vit kundu eisini sagt, at læra tey evropeiska ella norðurlendska mentan. Hugsi, at danir meintu tað væl, men tað hevði verið illa vorðið um nú t. d. donsk ella føroysk børn vóru tikin heiman og sett út t. d. á onkran stovn í Lombardínum ella á Balkan fyri at búgva tey betur út til hetta jarðiska lívið.

Hetta hevur ofta verið tikið fram sum ein slagsíða í donskum grønlandspolitikki. Meg minnist fyri mongum árum síðani eina sending í danska útvarpinum DR um evnið. Tað vildi so illa til hjá fleiri av hesum stakkals børnum, at tá ið ein tí var farin, høvdu tey gloymt sítt egna móðirmál og dugdu illa danskt mál. Tey blivu málloysingar. Sjálvandi vóru tað tey, sum komu væl undan; men sum tikið verður til, tá ið fátækadømi nýtir: »Ilt er at vera bæði tykkin og fátækur«. Hugsandi er, at tað eisini er galdandi, tá ið mentanarloysi gevur seg til kennar í málinum. Tá er tú eisini bæði tykkin og fátækur.

Hetta kravið, sum politiskir flokkar krevja av grønlendingum, búsitandi í Danmark, líkist eitt sindur tí, sum Robert Mogabe setir fæloysingunum í Zimbabwe. _ Burtur við teimum ognarleysu! Tey skulu ikki sita við Storkagosbrunnin og sutla øl í seg dag um dag og vera eitt lýti í tí danska høvuðsstaðnum. Nei, nú skal høgra politikkurin standa sína roynd. Nú skal sami andin, sum er í tí danska fólkaflokkinum við Piu Kjærsgaard á odda, í holdið hjá tí danska javnaðarflokkinum við Helle T. Smith sum »galiónsfiguri«! Anders Fogh og Bent Bendsen eru farnir í politisku songina hjá Piu Kjærgaards tíðum. Nú skal politiska rákið ganga út yvir myrkhærdar, døkkar grønlendingar, sum eru endaðir við henda gosbrunn, og kanska er tað so »vordið«, at onkur teirra var tikin heimanífrá í góðari meining og settur út, men kláraði ikki sína ódn at ganga og merkja nú koyrilin frá politiska rákinum á sínum egna kroppi. »Jú, ilt er at vera bæði tykkin og fátækur«.

# Latið Bryggjaríðini skonkja



**Johan Mortensen**
*PF Restorffs bryggjarí*

Sum kunnugt er í løtuni focus á sølu av øli á tónleikafestivalum og størri dansitiltøkum. Tað er ein sannroynd at kunnu festivalfólk keypa sær ein veikan øl sum teimum lystir afturvið tónleikinum tálmar hetta ovurnýtslu av rúsdrekka í mun til støðuna ídag, har fólk lík klyvjarossum draga ryggsekkir við sprutti og øli, meira ella minni ótarnaði, inn á festivaløkini.

Harnæst skal sigast, at vit uttan iva eru einasta land í heiminum har ikki er loyvt at selja øl á einum tónleikafestivali. Hvat er rockur uttan øl? Rúsdrekkalógin má endurskoðast. Í okkara alheimsgerð og við politiskum visiónum um eitt modernað, altjóða Føroyar ber ikki til at halda lív í miðaldarligum lógum og fyriskipanum. Spurningurin er eisini nær EU fer at vísa á at okkara monopolsøla, Rúsan, er kappingaravlagandi mótvegis EU framleiðslum.

Eg loyvi mær at skjóta upp at Vinnumálastýrið - sum eina fyribils loysn - beinanvegin heimilar føroysku bryggjaíðunum at selja øl á nevndu festivalum og tiltøkum.

Hetta vil viðføra eina kontrolleraða sølu av øli sum øll verða nøgd við.

Vinnumálaráðharrin er sjálvandi eisini greiður yvir at inntøkur Landskassans av øli og rúsdrekka eru omanfyri 70 mió árliga og í vøkstri, so henda vinnan er eitt munandi íkast til búskapin. Ábyrgdafullir, vinnulívsorienteraðir politikarir mugu lurta eftir ynskjum frá hesari vinnu, hóast promillur kunnu kosta atkvøður.

# Rætting

Í samband vid viðtalu við Suna á Dalbø um útbúgvingstig hevur týdning fyri førleikan hjá ráðharrum í okkara styrisskipan (grein í Sosialinum tann 16.07.05), hevur blaðmaðurin gloymt at tikid eina viðmerking frá Suna á Dalbø við. Suni legði dent á, at dømið vid J. Purkhús skuldi skrivast soleidis, at tad varð heilt greitt, at hetta Suni segdi IKKI var eitt álop á ein einstakan persón/ráðharra, men bert eitt sigandi dømi um, at tad ikki er gjørligt í eini demokratiskari styrisskipan at "tryggja seg" vid at velja rádharrar vid vidkomandi fakligum førleika. Blaðmaðurin vil hervið biðja um umbering fyri mistakið.

*.páll*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.